# Tríggjar dagar um hvørja spurnarkapping

**Suni Merkistein er tann, sum skipar fyri hesum, so vælkendu spurnarkappingunum fyri framhaldsskúlar. Suni veit ikki, um henda spurnarkapping verður aftur á skránni í vetur, og sigur hann, at seinastu tíðina hevur verið ringt at endurnýggja seg sjálvan og spurningarnar**

SPURNARKAPPING
*Ingrid Bjarnastein*



*Suni Merkistein hevur seinastu trý árini skipað fyri spurnarkappingum fyri framhaldsskúlar. Nú umhugsar spurnarkappingaverturin um at leggja árarnar inn*

– Nú havi eg gjørt allar spurningarnar sjálvur, og tað vísir seg, at tað er ein trupulleiki at endurnýggja seg sjálvan og tað er ringt at finna uppá nakað nýtt, sigur Suni Merkistein, útvarpsvertur.

Tá Suni skal gera spurningarnar, setur hann seg við bókum, leksikon, søgubókum, ja, so at siga øllum keldutilfari og leitar eftir onkrum, ið kann tykjast áhugavert. Hann roynir at leggja seg eftir at gera spurningarnar eitt sindur djúpar, soleiðis, at teir ikki bara eru eina reglu til longdar, men kanska eini fimm. Soleiðis fær lurtarin meira gleði og vitan burturúr at lurta eftir spurnarkappingini.

– Tað eru jú nøkur føst evni, sum eg leiti eftir. Eini sjey høvuðsevni, umframt árstalsspurningarnar. Til hesar árstalsspurningarnar, so havi eg leitað í ringbindum, sum hava verið nýtt til »Nær var tað?« spurnarkappingarnar, tí har liggur ein rúgva av tilfari inni, og so hava Hvem, Hvad, Hvor bøkurnar eisini verið nógv frammi.

### Longri tíð

Sum árini eru liðin tekur tað longri og longri tíð at gera teir 24 spurningarnar, sum skulu til hvørja spurnarkapping. Í miðal metir Suni, at hann brúkar eini tríggjar dagar um at fáa teir 24 spurningar klárar.

– Teir skulu sita ordiligt og hava eitt sindur meira av substansi enn bara ein spurningur uppá eina reglu, sigur Suni.

Sjálvur heldur útvarpsverturin, at spurnarkappingin eru tilpassaðar ungdóminum – í øllum førum eitt sindur. Til dømis tónleika- og filmsspurningarnir eru serliga gjørdir ungdóminum, men longu har er tað rættiliga avmarkað.

– Um eg taki ein bólk, sum er eini 20 ára gamal, so síggi eg longu, at næmingarnir fáa verri við at gita, hvat tað er, uttan so, at tað er okkurt heilt serligt. Men sum heild eru tónleika-, ítrótta- og filmsspurningarnir rættiliga nýggir.

Suni Merkistein sigur, at hann hevur varhugan av, at skúlarnir taka hetta rættiliga álvarsamt. Og í ár hevur eisini verið rættiliga javnt ímillum allar skúlarnar. Eini fimm ella seks vóru í umbúna til at vinna, meðan hini árini hava tað verið nakrir heilt fáir, ið hava skarað framúr.

– Kanska skúlarnir eru vorðnir meira tilvitaðir um, hvørjar næmingar teir skulu senda. Í fyrstuni var hetta kanska ikki tikið eins álvarsamt, men nú verður meira æra helst løgd í at vera við

– Sum heild eri eg rættiliga imponeraður av næmingunum. Serliga í søguspurningunum vita teir ógvuliga væl. Í bókmentum eru teir eitt sindur veikari, men samanumtikið eri eg rættiliga imponeraður, sigur Suni Merkistein.

Tey bæði undanfarnu árini hava allir skúlarnir verið við. Men í ár meldaði Vestmanna skúli úr sum tann einasti.

Sjálvur dugir hann ikki at siga, um spurnarkappingin verður á skránni aftur í vetur. Hann leggur dent á, at kennir tað sum um hann er koyrdur fastur í einum spori, og kundi tí hugsað sær møguliga at gera okkurt annað.

– Fleiri ferðir í vetur meðan eg havi gjørt spurningar, havi eg hugsað við mær sjálvum, at hetta geri eg ikki aftur, so tað verður ikki uppá standandi fót, at eg fari at siga ja til at gera eina slíka spurnarkapping aftur komandi ár, sigur útvarpsverturin at enda.

# Síðsti fortreðdagur í Hoydølum



*3. s´ararnir royndu sum frægast at gera vart við seg í gjáramorgunin, men løgreglan kom skjótt og steðgaði hesum hátíðardámi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Skúlin er liðugur í daaaaag, skúlin er liðugur í daaag... Hetta er uttan iva niðurlagið 3. s´ararnir hava sungið í allan gjáramorgunin, tí um 8 tíðina tá avbygdafólk komu til Havnar, stóð ein rúgva av 3. s´arum á vegnum við Hoydalar. Tey steðgaðu ferðsluni, tóku í viskarar og gjørdu vart við seg á ymsan hátt. Men tað kann ein kanska heldur ikki siga teimum ilt fyri, tí dagurin í gjár var nevniliga teirra síðsti skúladagur. So hetta skuldi jú hátíðarhaldast við einum braki.

-ib

Platform 1 ár:

# 40.000 gestir á vitjan

**Komandi vikuskifti er eitt ár síðani Platform lat dyrnar upp fyri at bjóða teimum, ið hava hug, vælkomin. Og hevur seinasta árið, fyri nýggja diskotekið, hilnast ógvuliga væl**

FØÐINGARDAGUR
*Ingrid Bjarnastein*



*Calvin Clarke spældi á bongotrummur í Platform í heyst. Hann er ein av teimum mongu útlendsku gestunum, sum hevur vitjað á diskotekinum*

Supply One og Supply Two eru nøvnini á teimum báðum barrunum, og har kanst tú keypa spillolju, diesel og bensin, ið veruliga benda á, a tú ert á einum platformi.

Komandi vikuskifti fyllir nýggjasta diskotekið í Havnini so eitt ár, og verður hetta hátíðarhildið við einum braki. Fríggjakvøldið bjóðar Platform gestunum ókeypis øl og leygarkvøldið verður sjampagna til tey, ið leita sær upp á fjórðu hædd í Havnar Klubba.

Havgrímur Johannesen, sum eigur og rekur Platform, fegnast um góðu undirtøkuna, diskotekið hevur fingið.

– Sjálvandi eri eg væl nøgdur, sigur Havgrímur Johannesen. – Vit hava nú havt opið í eitt ár, og hetta árið hevur verið útselt hvørt leygarkvøld, so tað er bara at fegnast um.

### Live tónleikur

Av og á er eisini live-tónleikur á diskotekinum. Tá kemur ein bólkur inn og undirheldur, men diskotek er eisini. Av bólkunum, ið hava verið og spælt á Platform kunnu nevnast, Tangz, Clickhaze, All That Rain, James Olsen Band, Taxi, Lena & Niclas o.o.

12 plátuvendarar hava verið og snarað plátum, og fleiri av teimum eru eisini komnir tað longu leiðina úr Danmark. Umframt livetónleik og ymsar plátuvendarar, so hava onnur kend fólk eisini leitað sær á boripallin. Millum annað hava fleiri úr realitysendingini Baren, bæði 2001 og 2002, verið á vitjan, og eisini onkur úr Big Brother 2001.

– Eg haldi, at vit hava megnað, at raka aldursbólkin, sum miðað varð ímóti av fyrstan tíð. Nógv varð tosað um, at tað fóru helst eldri fólk at koma, men her eru flest øll millum 22 og 29 ár, men sjálvandi eru eisini bæði eldri og yngri gestir. Til dømis til jólaborðhaldini, tá eru fólk ímillum 18 og 60 ár við, greiðir Havgrímur frá.

Hetta seinasta árið hava millum 30. og 40.000 fólk verið á gáttini, og tað er onki, ið bendir á, at hetta talið fer at minka.

ítróttur

Nr. 98 • týsdagur • 28. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tvey flyta upp

**FSF hevur nú gjørt av, hvussu kappingin í kvinnudeildini skal skipast, eftir at VB hevur tikið sítt lið úr kappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað kom sum vera man illa við, at VB tók sítt lið úr kappingini í bestu kvinnudeildini. Hetta viðførdi, at tað nú bert eru fimm lið eftir í deildini, men eftir summarsteðgin kemur hetta tó aftur í rættlag.

Kappingernevndin hevur gjørt av, at besta liðið í aðru deild flytir beinleiðis upp í bestu deildina eftir summarsteðgin, meðan niðasta liðið í fyrstu deild skal spæla móti teimum næstovastu í aðru um upp- og niðurflyting.

# Døpur tøl

**Roknskapurin hjá FIFA sýnir stór afturstig í mun til ætlaðu tølini, men er tó ikki heilt so vánaligur, sum áður mett, og framvegis tykist spenningur vera um formansvalið**

FÓTBÓLTSPOLITIKKUR
*Jákup Mørk*



*Enn er ikki greitt, hvørja støðu føroysku umboðini fara at taka, tá formansvalið er á skránni, men hóas roknskapartølini ikki eru heilt so døpur, sum onkur hevði gitt, so styrkja tey neyvan um støðuna hjá Blatter*

Í leygardagsútgávu okkara skrivaðu vit, at føroysku umboðini á aðalfundinum hjá FIFA enn ikki hava gjørt av, hvussu teirra atkvøður skulu fella, tá formansvalið stendur á skránni.

Høvuðsorsøkina til hetta segði Dánjal Andreasen, formaður í FSF, vera, at teir enn ikki høvdu sæð frágreiðingina við ákærunum móti Blatter, og at teir ikki vildu døma nakran, áðrenn teir høvdu sæð prógvini fyri ákærunum.

### Góður í nakrar mátar

Norska blaðið, Dagens Nyheter, hevði herfyri eina samrøðu við UEFA forsetan, Lennart Johanson, og í hesum hevur sviin, sum seinast stillaði upp ímóti Sepp Blatter, samanborið Føroyar við lond sum Tahiti og Jamaica.

Í blaðnum verður hann millum annað siteraður fyri at siga, at so leingi sum smálond sum Tahiti, Jamaica og Føroyar fáa tann pening, sum teimum er lovað, so leggja tey líka í, hvussu vit klandrast við Blatter.

Tá vit spyrja Dánjal Andreasen, um nakað hald er í hesum, hevur hann mest av øllum hug at smílast.

- Sjálvandi hevur fíggjarligi parturin nakað at siga, og sum skilst, so hevur úrslitið hjá FIFA ikki verið heilt so galið, sum tað eina tíð var vandi fyri, men eg haldi tó ikki, at vit skulu samanberast við hasi londini.

- Tað er tó ein sannroynd, at Blatter í nógvar mátar hevur verið ein góður stuðul hjá teimum londum, har fótbólturin traditionelt ikki hevur verið so nógv frammi.

- Eitt nú hevur hann roynt at lagt stórar kappingar í lond, sum ikki hava so drúgva siðvenju á økinum, og í so máta kanst tú væl siga, at hann hevur verið við til at globalisera fótbóltin.

### Fýra milliardir resta

Síðani prátið við Dánjal Andreasen varð gjørt, hevur FIFA lagt roknskapartølini fyri farna árið á borið, og hóast tey ikki eru heilt so ræðandi, sum fleiri hava gitt, so er greitt, at nógv restar í, áðrenn væntaða úrslitið kann realiserast.

Við árslok 2001 var samlaða gjaldførið hjá fótbóltssamgonguni umleið 2,1 mia.kr, og hóast hetta ljóðar av nógvum, so er hetta nakað væl minni enn tær 6,2 mia.kr., sum eftir ætlanini skuldu verið í kassanum um hetta mundið.

Ein partur av hesum stavar frá, at felagið hjá FIFA, sum skuldi standa fyri sølu av sjónvarps- og lýsingarrættindum, fór av knóranum. Sambært uppgerðini, sum nú fyriliggur var missurin av hesum 188 mió.kr, og ikki 260 mió.kr., sum roknað varð við, men yvirhøvur tykist hendan upphæddin ikki at muna serliga nógv í samlaða roknskapinum.

### Argentina fær ikki undantak

At enda kann nevnast, at hóast aðalfundurin ikki verður settur fyrr enn mánadagin, so hevur ovasti myndugleikin í FIFA longu nú tikið onkrar avgerðir.

Eitt nú hava fimm lond fingið forboð fyri at atkvøða, tí tey hava møtt ov illa upp á fundunum hjá FIFA, og eisini er eitt heldur sermerkt mál við Argentina avgreitt.

Argentinar høvdu nevnliga biðið FIFA um loyvi at nýta tøl upp til 24 á troyggjunum í HM, soleiðis at eingin leikari kundi hava nummar 10 á rygginum. Hetta var ætlað til at heiðrað fyrrverandi stórleikara teirra, Diego Maradona, men hesum ynskinum hevur FIFA ikki eftirlíkað. Øll londini skulu hava troyggjur við tølunum frá 1 til 23 eru greiðu boðini frá aðalfundinum.

# Kappróður á Skála

**Sammett við FM-kappingina í fjør vóru fleiri nýggir vinnarar á Skála um vikuskiftið**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*

Um vikuskiftið var stevna á Skála. Talan var aftur í ár um seinastu stevnuna undan FM-kappingini, og tí var spenningurin hampuliga stórur um, hvussu ymsu bátarnir tykjast vera fyri í ár.

Og í so máta gjørdist úrslitini í nógvar mátar spennandi. Tað var nevnliga bert í tí eina róðrinum, at vinnandi báturin var hin sami, sum gjørdist føroyameistari í fjør. Hetta var í 5-mannaførum hjá gentum. Í øðrum førum gjørdu nýggjar manningar í nýggjum bátum um seg, so nógv bendir á, at vit komandi tveir mánaðirnar fáa eina sera spenandi FM-kapping.

Niðan fyri síggjast tríggir teir fremstu bátarnir í ymsu róðrunum.

*Vestmenningur vann hesa ferð róðurin hjá 10-mannaførum*




6-mannafør, kvinnur
1 Jarnbardur
2 Riddarin
3 Páll Fangi

5-mannafør, dreingir
1 Blikur
2 Sílið
3 Tjaldrið

5-mannafør, gentur
1 Fípan Fagra
2 Blikur
3 Drekin

6-mannafør, menn
1 Páll Fangi
2 Gongurólvur
3 Strálan

8-mannafør
1 Knørrur
2 Kvívíkingur
3 Argjabáturin

10-mannafør
1 Vestmenningur
2 Eysturoyingur
3 Klaksvíkingur